# UNG Í ARBEIÐI

Sera nógv ung nýta summarfrítíð sína til at vinna sær nøkur eyka oyru í lumman. Dan Petersen og Bjarni Bjørgvinsson Poulsen eru tveir teirra. Hvønn dag arbeiða teir uttan fyri Sjómansheimið í Havn:

– Vit leggja flísar á gongugøtuna. Tað er strævið, men somuleiðis stuttligt at vera í gongd allan dagin. Og so tjena vit eisini pengar, siga teir báðir.

Dan og Bjarni fara at arbeiða næstan alla summarfrítíðina, men tó fáa teir frí á ólavsøku:

– Vit fara at brúka pengarnar, tá vit fara at ferðast, skoyta teir uppí.

Dan fer til Rhodos í august, meðan Bjarni skal á ferð við flokkinum.



Bjarni og Dan stíðast og strevast á gongugøtuni í Havn.

## HITLIST

### 15 tær bestu

ÚF

| | | |
|---|---|---|
| 1. | The Dreams | Sasa Sa, Sa |
| 2. | Teitur | Louis, Louis |
| 3. | Red Hot Chili Peppers | Dani... |
| 4. | The Rasmus | Sail Away |
| 5. | Lordi | Hard Rock Hallelujah |
| 6. | Høgni Lisberg | Just Dig |
| 7. | Wyclef Jean & Shakira | Hips Don´t... |
| 8. | Side Effect | Murder #1 |
| 9. | Pussycat Dolls feat. | Big Snoop Dog... |
| 10. | Robbie Williams | Sin Sin Sin |
| 11. | Pink | Who Knew |
| 12. | High Hat feat Heiðrik | Rasputin |
| 13. | The Story Ends | Dancing in... |
| 14. | Gnarls Barkley | Crazy |
| 15. | Nelly Furtado | Maneater |

### Tjeklisten

DR

| | | |
|---|---|---|
| 1. | UFO Yepha | Hængekøjen |
| 2. | Tina Dickow | Losing |
| 3. | Nordstrøm | Berlin |
| 4. | Lordi | Hard Rock Hallelujah |
| 5. | Outlandish | I Only Ask Of God |
| 6. | Nelly Furtaldo | Maneater |
| 7. | Raconteurs | Steady, As Of Goes |
| 8. | Gnaris Barkley | Crazy |
| 9. | Streets | Never Went To Church |
| 10. | Red Hot Chili Peppers | Dani California |
| 11. | Madonna | Get Together |
| 12. | Johnson | Kig Forbi |
| 13. | Peter Sommer | 8-6-6-0 |
| 14. | Keane | Is It Any Wonder |
| 15. | Kashmir | She's Made Of Chalk |
| 16. | Magtens Korridorer | Morgan |
| 17. | Shakira feat. Wyclef Jean | Hips Don't Lie |
| 18. | Depeche Mode | John The Revelator |
| 19. | Coldplay | The Hardest Part |
| 20. | Infernal | Ten Miles |

### Top of the Pops

BBC

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Lily Allen | Smile |
| 2. | Shakira ft. Wyclef Jean | Hips Don't... |
| 3. | Razorlight | In The Morning |
| 4. | Nelly Furtado | Maneater |
| 5. | Paolo Nutini | Last Request |
| 6. | Sandi Thom | I Wish I Was A Punk Rocker |
| 7. | Pussycat Dolls ft. Snoop Dog | Buttons |
| 8. | Ne-Yo | Sexy Love |
| 9. | Bob Sinclair ft. Steve Edwards | Worls Hold On |
| 10. | The Kooks | She Moves In Her Own Way |
| 11. | The Automatic | Monster |
| 12. | The Zutons | Valerie |
| 13. | George Michael | An Easier Affair |
| 14. | Sergio Mendes/Black Eyed Peas | Mas Que Nada |
| 15. | Infernal | From Paris To Berlin' |
| 16. | Pink | Who Knew |
| 17. | Muse | Supermassive Black Hole |
| 18. | Rogue Traders | Voodoo Child |
| 19. | Lostprophets | Rooftops |
| 20. | Justice vs Simian | We Are Your Friends |

### Billboard

Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Nelly Furtado Featuring Timbaland | Promiscuous |
| 2. | Shakira Featuring Wyclef Jean | Hips Don't Lie |
| 3. | Gnarls Barkley | Crazy |
| 4. | Cassie | Me & U |
| 5. | Yung Joc | It's Goin' Down |
| 6. | Christina Aguilera | Ain't No Other Man |
| 7. | Chamillionaire Feat. Krayzie Bone | Ridin' |
| 8. | Rihanna | Unfaithful |
| 9. | Lil Jon Featuring E-40 & Sean Paul Of The YoungBloodZ | Snap Yo Fingers |
| 10. | Field Mob Featuring Ciara | So What |

sound

# 4500 DOYGGJA AV LETI



Leti ger einki uttan last, sigur orðatakið. Og sambært www.eb.dk liggja alt ov nógvir danskarar og flóta framman fyri sjónvarpinum og røra seg alt ov lítið. Sambært heimasíðuni kostar júst hetta 4500 lív um árið.

Triði hvør danskari tekur lyftuna heldur enn at ganga upp gjøgnum trappurnar, bilin staðin fyri súkkluna, blaka seg á sofuna og fara ongantíð ein túr ella íðka annan ítrótt. Men hetta kunnu vit sambært www.eb.dk doyggja av.

Ein kanning, sum Statens Institut for Folkesundhed í Danmark hevur almannakunngjørt, vísir, at 4500 danskarar doyggja hvørt ár av at dagliga røra seg ov lítið.

Kanningin staðfestir, at fólk, sum ikki eru likamliga virkin, doyggja fimm-seks ár fyrr enn tey, ið dagliga røra seg.

Human fysiologurin í Heilsuráðnum, Sune Krarup-Pedersen, heldur at hetta er ein vaksandi trupulleiki, og at vit skjótt verða á sama støði sum amerikanarar.



# MARIAH CAREY MINKAÐ BURTUR Í EINKI

– Øll hildu, eg líktist einum baðidjóri við ov nógvari luft í, sigur Mariah Carey, sum júst hevur tapt seg um 15 kilo.

Songfuglurin, Mariah Carey, skal 5. august á konsertferð. Í hesum høpi hevur hon tapt seg heili 15 kilo.

– Nú eri eg fullkomin, sigur poppstjørnan, sum hevur verið upp á A seinastu fýra mánaðirnar.

Mariah Carey avdúkar somuleiðis, at hon hevur tapt seg, tí hon hevur runnið og íðkað fimleik í vatni.